## Nygaard tapti



Queens Park Rangers spældi seinasta vikuskiftið á heimavølli ímóti Crewe í næstbestu ensku deildini. Marc Nygaard, sum hevur føroysk ættarbond, spældi sum vant í álopinum hjá Queens Park Rangers, men hann og liðfelagarnir noyddust at lúta. Crewe legði seg á odda 2-0, áðrenn QPR seint í dystinum minkaði til 2-1. Marc Nygaard spældi allan dystin og hevði onkrar naskar royndir, men hann fekk ikki mál hesaferð

## Nýggjur Todi í FCK

Klaksvíkingurin Kristoffur Jakobsen venur hesa vikuna í FC Keypmannahavn, og danska heimasíðan bold.dk samantvinnar hann beinanvegin við ein annan føroyskan spælara í FCK, nevniliga Toda Jónsson.

– Ny Todi træner med FCK. I 1990erne huserede Todi Jónsson i FCKs angreb. Nu er den 17-årige færing Kristoffur Jakobsen fra Todis gamle klub Klaksvik til prøvetræning, skrivar bold.dk

Kristoffur Jakobsen royndi seg longu í fjør á besta liðnum hjá KÍ, og hann hevur fleiri ferðir áður verið uttanlands og vant við stórum feløgum. Kristoffur skal venja við bæði superligaliðnum og eykaliðnum hjá FCK.

# Andras vann sprint triathlon

**Andras Joensen tók mótstøðumenninar í renninginum og vann harvið fyrstu triathlon-kappingina í ár**

TRIATHLON

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Sunnudagin skipaði Føroya Triathlon Felag fyri kapping í tí, sum verður rópt sprint triathlon. Hetta er ein kapping, har svomið verður 750 metrar, súkklað verður 20 kilometrar og runnið verður 5 kilometrar.

Kappingin var í Havn. Svomið var í svimjihøllini í Gundadali, og súkklað og runnið varð eftir vegnum í høvuðsstaðnum. Nakað av órógvi var av ferðslu, men annars gekk kappingin væl.

### Andras vann

Ottar í Hjøllum var fyrst úr hylinum, síðani kom Remi Lamhauge og 1-2 minutt aftaná komu so Evald Rasmussen og Andrass Joensen. Nakað aftanfyri teir komu so Kári Simonsen og Áslakkur Nesá. Ottar var eisini fyrstur út á súkkluna, men her vísti tað seg, sum ikki einaferð, at royndir hava nógv at siga í hesi trídeildu ítróttagrein.

Evald, sum var triðjur upp úr hylinum, skifti skjótast, var næstur út á súkklurutuna, og var skjótt fremstur. Hann fór eisini fyrstur út á rennirutuna, men Andrass vísti hesaferð, at hann er ein góður rennari. 100 metrar frá málinum fór hann fram um Evald og vann sostatt fyrstu triathlonkappingina í ár. Nummar 2 gjørdist Evald Rasmussen, og Remi Langgaard var nummar 3.

### Kappast á OL-teini

14 mai verður aftur kappast, tá er tað OL-teinurin, sum sær soleiðis út: Svomið verður 1500m í svimjihøllini. Súkklað verður frá høllini, til Kaldbaks, Kaldbaksbotn, Kaldbak, rundkoyringina við R.C. Effersøesgøtu, og oman til Plantusøluna. Teinurin er 40 km. Runnið verður frá Skógrøkt Landsins, fram við Strond til Føroya Sparikassa, og aftur til Skógrøkt Landsins. Teinurin er 5 km og skal rennast tvær ferðir.



*Andras Joensen vann kappingina í sprint triathlon. Evald Rasmussen varð nummar tvey og Remi Langgaard nummar trý*

## Kyndil í serflokki



Dreingir 12 hjá Kyndli hava vunnið greipuna, ella trippul sum teir sjálvir vilja vera við. Seinasta leygardag vunnu teir finaluna í steypakappingini. Vikuskiftið frammanundan fingu teir gullkrónurnar eftir at teir høvdu tryggja sær FM-heitið fleiri umfør frammanundan, og fyrr í mánaðanum vunnu teir jubileums-kappingina, sum Kyndil skipaði fyri í sambandi við 50-ára stovningardagin. Sostatt hava dreingirnir vunni allar kappingar teir hava luttikið í í kappingarárinum. Olsen, Kyndil 12 ár eru húkandi frá vinstru: Sverri Mohr Mortensen, Ivan Hofgaard, Magnus Egilsson, Tróndur Jensen, Høgni Klein Olsen. Standandi frá vinstru: Frank Askildsen, Rene Joensen, Oyvind Lützen, Rógvi Reinert, Hjalmar Klein venjari

## Tvøradreingir vunnu



Herfyri var endaumfarið í hondbólti hjá dreingjum 12 b. Hesaferð varð endaumfarið á Tvøroyri og hetta er fyrstu ferð, at eitt endaumfar er á Tvøroyri yvirhøvur, so tað var ein søguligur dagur. Kappingin varð í høllini í Trongisvági og tað vóru fýra lið í kappingini: TB, KÍF, H71 og Kyndil b.

Hondbóltur er gomul ítrótt á Tvøroyri, men hjá monnunum datt tað niðurfyri í nitiárunum, tá ið kreppan var og fráflytingin var stór. Men nú verður so roynt at bygt uppaftur.Og fyribils sær út til at vignast væl, tí í hesum endaumfarinum vunnu tvøradreingirnir allar sínar dystir og sostatt vunnu teir eisini kappingina.

Standandi frá vinstru eru tað: Kári venjari, Jákup, Kjartan, Athur, Gilli og Birgir venjari. Sitandi frá vinstru eru Jarmund, Teitur, Patrik, Heini og Ragnar og tann, sum liggur vinstrumegin eitur Margeir og hin eitur Rógvi